*Framhald av síðu 21*

javnaðarfólk og eisini samkynd á anstaltir til avvenjing ella heilatvátt, vísir Eyðun Joensen á.

Hóast tað etiskt er forkastiligt, er Eyðun Joensen sannførdur um, at tað letur seg gera reint tekniskt at venja fólk av við samkyndan atburð.

– Hóast tú illa fært broytt hugin, ivist eg ikki í, at tað reint tekniskt letur seg gera at venja fólk av við samkyndan atburð. Russar brúktu óhugnaligar, ótespiligar, atferðssálarligar snildur, sigur sálarfrøðingurin, sum spyr um hetta er tað, Miðflokkurin ætlar at bjóða sínum annars púra meinaleysum føroysku medborgarum.

### Ein fjøltáttað bukett

– Menniskjað er ein ótrúliga samansett vera. Nógv meira, enn myndin hjá Jenisi og Miðflokkinum gevur pláss fyri. Menniskjað er ein nógv meira fjøltáttað bukett, filosoferar sálarfrøðingurin, tá hann verður spurdur um, hvør menniskjafatan liggur aftan fyri politikkin hjá Miðflokkinum.

Sambært Eyðuni Joensen er herferðin hjá Miðflokkinum mótvegis teimum samkyndu eitt tekin um ein ótrúliga primitivan og avmarkaðan hugburð um seksualitet.

– Tað tykist mær sum um, at tá mann fokuserar so nógv uppá samkynd sum nakað skeivt, er tað eitt tekin um, at mann fokuserar ov nógv uppá sjálva seksualatferðina, og mann gloymir, at kærleikslívið inniber so nógv meira enn tað. Eg ivist ikki í, at tvey samkynd kunnu hava eitt ríkt kærleikslív fyri seg sjálvi, ríkari enn kanska onkur hinkynd kunnu, hóast tey samkyndu reint lívfrøðisliga ikki kunnu gerast foreldur saman, sigur Eyðun Joensen.

### Kinsey rapportin

Eyðun Joensen vísir sum sálarfrøðingur á, at tølini hjá Miðflokkinum, sum vísa hvussu nógv eru samkynd í londunum rundan um okkum, eru alt ov lág.

– Tað er rættiliga trupult at máta slíkt, tí fólk tora so illa at viðganga tað. Kinsey rapportin frá 40´unum vísir, at 4% av øllum mannligum amerikanskum borgarum í aldrinum 16-64 ár viðganga, at teir einans fáast við tað, sum verður kallað homoseksuellan praktik. Hendan kanning er gjørd í 40´unum. Í einari tíð, har fá mannfólk í mun til í dag vóru komin úr skápinum, umframt at ongar kvinnur eru við í kanningini. Við hesum í geyma ber til at ímynda sær, at um líknandi kanning var gjørd í dag, vóru tølini væl hægri, greiðir sálarfrøðingurin frá.

### Vantandi vitan

Eyðun Joensen er harmur um, at tey samkyndu enn í dag hava ein trupulleika í Føroyum. Hann vísir á, at hann í lívslanga starvi sínum sum sálarfrøðingur, oftari enn so hevur havt við fólk at gera, sum eru flutt av landinum, tí at her ikki var nøkur onnur loysn. Tað var ikki liviligt fyri tey at vera í Føroyum.

– Hatta er rein landsforvísing. Tað skal vera rúm fyri øllum í Føroyum. Sum lítil minniluti eiga samkynd eisini at vera told í samfelagnum. Orðið, samfelag, merkir felagsskapur fyri øll. Men samkynd hava ein trupulleika, tí tey sleppa ikki upp í hendan felagsskap. Og tað er stórt spell, tá mann útflytir trupulleikan, heldur Eyðun Joensen.

Hann vísir á, at fyri 50 árum síðan sendu vit enn tey evnaveiku av landinum. Fyri 40 árum síðani sendu vit enn tey sálarsjúku av landinum. Nú er so tíbetur pláss fyri teimum aftur í

TING-HELLAN

Føroyum. Og tað hevur ríkað báðar partar. Men í dag eru tað tey samkyndu, sum vit senda av landinum. Og er tað nakað, sum tey evnaveiku og sálarsjúku hava lært okkum, er tað, at fordómar er vantandi vitan, fáfongd og ótti.

# A, C og E er loysnin eftir valið

**Ein slík stór samgonga kundi tryggjað okkum ein góðan almannapolitikk, ein sterkan vinnupolitikk og framhald av sjálvstýristilgongdini**

*Finnbogi Ísakson*



Allar veljarakanningar eru ikki líka eftirfarandi, og tann seinasta stóra kanningin, har eini 2500 fólk vórðu spurd, er neyvan nakað undantak í so máta. Mær tykir, at spurningurin er ikki, hvussu mong verða spurd, men hvussu væl verður rakt, tá úrvalið verður gjørt. Í tí stóra Amerika plaga tey ikki at spyrja fleiri enn 1000 fólk, og mangan raka tey rættiliga rætt kortini.

Tað tykir mær lítið trúligt, at Sambandsflokkurin fær báðar tingmenninar í Vágum, og eg havi eisini ilt við at trúgva, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin fara at býta teir fýra valdømisvaldu í Suðuroynni ímillum sín, hóast hetta hevur hent fyrr. Aðrastaðni er munurin millum flokkarnar sera lítil, eitt nú millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin í Sandoynni. At Fólkaflokkurin ikki fær meira enn ein tingmann í háborg síni, Suðurstreymoy, passar rætt og slætt ikki.

### Trúverdugt kortini

Hesin ivin merkir tó ikki, at eg haldi, at kanningin als ikki er eftirfarandi. Tað er hon. Eitt, sum bendir á tað, er, at tendensurin er tann sami sum í seinastu kanning, gjørd undan hesari: teir báðir stóru samgonguflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin, fara at ganga aftur, og teir báðir stóru andstøðuflokkarnir, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, fara at ganga fram. Roknast má við, at teir báðir smáu flokkarnir fáa ein tingmann hvør, men neyvan meir.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fáa ikki 18 tingmenn tilsamans, sum kanningin vísir. Eg ivist í, at teir fáa 17. Men teir kunna fáa 16, og tá kunna teir skipa samgongu við, sum so mangan, at fáa Sjálvstýrisflokkin uppí.

Teir báðir stóru samgonguflokkarnir hava sitið í tveimum buldrasligum samgongum í 6 ár. Tað er einki óvanligt í tí - hvørki her á landi ella aðrastaðni - at tað slítur uppá flokkar at sita við stjórnarvaldinum. Serliga ringt má tað vera her, tá hugsað verður um, hvussu nógvar og stórar rembingar hava verið innan fyri samgonguna, serliga tey seinastu árini, eftir at danska stjórnin torpederaði fullveldisætlanina við at halda fast við fýra ára skiftistíð í mesta lagi.

### Heimastýrissamgonga

Tey flestu munna vanta, at ein nýggj samgonga verður skipað millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin, serliga um hesir flokkar fáa meiriluta einsamallir, og um neyðugt saman við Sjálvstýrisflokkinum. Tað vóru teir tríggir flokkarnir, sum góðkendu Heimastýrislógina í 1948, og tí verður ein slík samgonga kalla ein Heimastýrissamgonga.

Hendir tað, fer hugsjónarloysi at valda. Valagnið hjá Sambandsflokkinum er skattalætti, sum fyrst og fremst kemur háinntøkunum til góðar. Leitar ein flokkur eftir fantasileysum projektum, skal hann bara lova skattalætta. Tað kann geva nakrar atkvøður fyri nógvar pengar. Men bara ein skattalætti ber ongum samfelagi uppi.

Javnaðarflokkurin fer uttan iva, sum flokkurin plagar, at leggja mesta dentin á at útbyggja tað sosiala økið.

Eg minnist aftur á árið 1966, tá eg fyrstu ferð varð valdur á ting. Í fýra ár høvdu vit havt Sjálvstýrislandsstýrið, sum hevði sett sær nøkulunda høg mál, men ongi rakk (uttan at yvirtaka jólaheilsanirnar, sum javnaðarmenn so skemtiliga plaga at taka til). Eftir valið í 1966 komu heimastýrisflokkarnir framat aftur, og - hóast tað soltna úrslitið hjá Sjálvstýrislandsstýrinum - tað kendist sum eitt stig aftur í fornøldina. Frammanundan høvdu av illum nakrar hugsjónir verið uppi og vent.

### A, C og E

Tann broytta fullveldistilgongdin skapar sera góðar møguleikar fyri einari stórari samgongu millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin. Tilgongdin gongur út uppá at yvirtaka málsøki, men ikki at fremja fullveldi í fyrsta umfari. Tað er júst tað, Javnaðarflokkurin alla tíðina hevur viljað, og tí eigur semja at kunna fáast um tann spurningin, um flokkarnir ikki læsa seg fastar frammanundan.

Tað skal ikki dyljast, at eg vildi hava hesa samgonguna longu í 1998, tí eg helt ov mong veik lið vera í tríflokkasamgonguni millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Men á tveimum fundum, sum eg var við á saman við Fólkaflokkinum, legði Anfinn Kallsberg dent á, at Fólkaflokkurin vildi hava eina smala samgongu, tvs at Javnaðarflokkurin skuldi ikki við.

Úrslitið av valinum komandi týsdag verður væntandi so, at Fólkaflokkurin - um hann ætlar sær at sleppa upp í part - neyvan tosar meira um eina smala samgongu.

Hesir flokkar hava sitið í tveimum samgongum fyrr. Í valskeiðinum 1974-78 og aftur í valskeiðinum 1978-80. Tá slitnaði samgongan í úrtíð av einari tápuligari ósemju um eitt fergukeyp. Tað var spell, tí við teimum høgu málum og góða samstarvi, sum samgongan hóast alt hevði, átti hon at vart í eini 10 ár aftrat.

Hesir tríggir flokkar eru so ymiskir, at finna teir eitt gott stev, umboða teir eina breidd í samfelagnum, sum ongin onnur samgonga kann. Fólkaflokkurin dentur mesta dentin á vinnulívið. Javnaðarflokkurin á almannaøkið. Tjóðveldisflokkurin á fullveldistilgongdina.

Kann tað vera betur?

### Løgmaður

So er spurningur, hvør skuldi verið løgmaður í einari slíkari samgongu? Summi halda kanska, at tað er ein sjálvfylgja, at tann størsti flokkurin fær løgmannin, men tað er tað ikki. Tjóðveldisflokkurin hevur verið størstu í fleiri samgongum, men hevur ongantíð havt løgmannin. Í seinnu helvt av valskeiðinum 1966-70 hevði Sambandsflokkurin løgmann, hóast Javnaðarflokkurin var størsti flokkur í samgonguni.

Hetta er heldur ikki óvanligt í okkara grannalondum. Í Danmark var Hilmar Baunsgaard úr Radikala flokkinum forsætisráðharri frá 1968, hóast bæði Konservativi Flokkurin og Vinstra vóru størri. Í Noregi er Kjeld Magne Bondevik úr Kristiliga Fólkaflokkinum forsætisráðharri, hóast Høgra er nógv størri.

Tað er tó neyvan nakað av ivast í, at verður Javnaðarflokkurin størsti flokkur í einari slíkari samgongu - sum veljarakanningarnar benda á - so fara teir at krevja løgmann. Tað plaga teir at gera.

Annað talar eisini fyri einum javnaðarløgmanni, hóast Javnaðarflokkurin ikki gerst størsti flokkur. Høgni Hoydal góðkennir neyvan Anfinn Kallsberg sum løgmann, og Anfinn Kallsberg góðkennir neyvan Høgna Hoydal.

Flokkarnir eiga tí longu nú at ásanna, at skal ein tríflokkasamgonga skipast millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin, so verður tað við Jóannesi Eidesgaard sum løgmanni. Tað er mítt tilmæli.

Alternativið er ein hugsjónarleys Heimastýrissamgonga.

# ítróttur

Nr. 11 • leygardagur • 17. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 18.01 | 14.30 | StÍF-Søljan |
| 18.01 | 15.00 | Stjørnan-VÍF |
| 18.01 | 15.00 | VB-Kyndil |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 17.01 | 14.00 | Dráttur-KÍF |
| 18.01 | 14.00 | ÍF-Fleyr |
| 18.01 | 15.00 | TB-Mjølnir |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 17.01 | 16.00 | SÍ-Fram |
| 18.01 | 16.00 | ÍF-Fleyr |



*Fær Stjørnan stigini í dystinum móti VÍF sunnudagin, so merkir tað eftir øllum at døma eitt farvæl til VÍF í stríðnum um gullkrónurnar*

# Lív ella deyði hjá VÍF

**Vinnur Stjørnan heimadystin á VÍF, verður FM-stríðið ein spurningur millum Klaksvíkina og Vág**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Trýstið er av álvara lagt á VÍF, tá tær sunnudagin fara til Klaksvíkar, har tær annað vikuskiftið á rað skulu spæla móti einum liði, sum verður roknað millum teirra, sum hava avgjørdan møguleika at taka gull í landskappingini.

Og eftir tepra tapið fyri VB seinasta vikuskifti eru treytirnar hjá VÍF somikið greiðar, at tær neyvan vóru øðrvísi, um talan var um steypakapping. Snøgt sagt, so er tað nú »vinn ella forsvinn« hjá VÍF, sum undan dystinum er fýra stig aftan fyri Stjørnuna.

Hjá heimaliðnum er sjálvandi eisini trýst á, men tó ikki á sama hátt. Sjálvsagt vildi tað verið eitt stórt stig fram móti gullmerkjunum, um Stjørnan fær bæði stigini her, men hinvegni er tað ikki nøkur vanlukka, um dysturin verður taptur. Hvussu víkir og vendir, so eru klaksvíkskvinnurnar eisini fremstar eftir vikuskiftið, men spurningurin er so bara, um tað er við einum ella trimum stigum.

Og líkt er til, at allar kanónir hjá báðum pørtum verða riggaðar til undan brakinum. Hjá VÍF tykist einasta ivamálið vera Fríða Marjunardóttir. Hon hevur seinastu longu tíðina drigist við ein treiskan vøddaskaða, men tað er lítið at ivast í, at tey í Vestmanna royna at pjøssa hana saman til dystin. Um tað so er nóg mikið til 60 minuttir er so nakað annað.

Og eisini í Klaksvík verður alt gjørt, til tess at fáa allar leikarar klárar til dystin. Annika Ljósstein og Lidia Vjvalijic hava báðar havt onkrar trupulleikar seinastu vikurnar, men tær verða so í øllum førum á vøllinum sunnudagin.

Tað sama verður nýggi trumfurin hjá Stjørnuni kanska eisini. Alina Olaru, sum fyri góðum mánaði síðani gjørdi av at skifta til VÍF úr StÍF, kom hósdagin aftur til landið. Enn hevur hon so bara vant einaferð saman við nýggju liðfeløgunum, so tað kann neyvan roknast við, at hon fær nakran avgerandi leiklut álagdan, men hon verður so við í hópinum sunnudagin.

### Søljan stevnir uppeftir

Er spenningur í oddinum, so er hann tað so sanniliga eisni í botninum av talvuni, tó at talan so neyvan verðu um niðurflyting fyri nakran av pørtunum.

Serliga tykist spenningurin um hetta stórur í Vágoynni, har Søljan nú tykist vera í ferð við at lyfta seg úr botninum. Seinasta dystin í grundspælinum vunnu tær á StÍF á Skála, og nú stendur júst sama uppgáva fyri framman. Megnar Søljan at vinna her, so eru útlitini fyri at lyfta seg upp á fimta plássið ikki heilt eingi, og eydnast tað, so er tað í øllum førum eitt stórt herðaklapp til felagið, sum annars hevur tað sera tungt í bestu deildini.

Seinasti dysturin um vikuskiftið er tann í Vági millum VB og Kyndil. Her er einki at ivast í, at VB fer avstað við sigrinum, og spurningurin er helst einamest, hvørt VB fer at leggja doyðin á at vinna sær eina betri málúrtøku, ella um tær fara at taka sær meira lætt fyri.

### Søljan vil uppfrá

Í hinum báðum dystunum, sum verða um vikuskiftið, er spenningurin kanska ikki heilt so stórur. Í øllum førum ikki, tá tosað verður um oddastríðið.

Men í botnstríðnum er støðan spakuliga við at gerast heilt spent. Ikki minst eftir at Søljan seinastu tíðina hevur tikið seg nógv fram, og í seinasta dystinum av grundspælinum gav hetta eisini úrslit í einum sigri á StÍF. Júst StÍF er mótstøðuliðið hjá teimum um vikuskiftið, og aftur verður dysturin leiktur á Skála. Megnar Søljan enn einaferð at vinna hesa uppgerðina, so eru útlitini fyri at røkka upp á fimta plássið ikki heilt eingi, og tað vildi í øllum førum verið eitt stórt herðaklapp til hondbóltin í Vágoynni, um hetta eydnaðist. Tí tað er ein sannroynd, at síðani Søljan aftur fór at blanda seg í kappingina í fremstu røð, so hevur tilvera teirra verið alt annað enn løtt.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið er í Vági, har VB tekur ímóti Kyndli. Her man tað ikki vera nakar stórvegis spenningur um, hvønn veg stigini skulu fara, tí tey man VB eiga fult og heilt. Hjá teimum er spurningurin kanska heldur, hvørt tær fara at nýta dystin til at betra enn meira um málúrtøkuna ella ikki.